# mmartónar

vóru konsertirnar í ár væl vitjaðar sum heild.

– Men serliga konsertirnar á smáplássum sum við Gjógv og í Mykinesi vóru nógv fólk. Hetta kemst væl av tí, at tað vanligt ikki eru so nógv tiltøk í smáu bygdunum. Tískil velja fólk eisini at vitja tiltøkini, tá okkurt hendir í bygdini. Harvið hava vit næstan altíð trygd fyri, at vit hava nakað av áhoyrarum, og av somu orsøk velja vit eisini at vitja hesi støð, greiðir Kristian Blak frá.

Hann vísir á, at í Havn og Klaksvík eru tilboðini fleiri og tískil ikki sama trygd fyri, at fólk velja teirra tiltak fram um okkurt annað.

Og sum Kristian Blak hevur víst á, so vóru tað altso mong, ið raðfestu teirra tiltak úti sum inni – í gjónni við Gjógv eins væl og í kirkjum, kunningarstovum, Norðurlandahúsinum og á øðrum støðum, ársins Summartónar vóru.













